STARVSLÝSING

# Laborantur til fiska- og djórasjúku-kanningarstovuna

FOOD VETERINARY and ENVIRONMENTAL AGENCY

Fyri laborant í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir laboranti til Fiska- og djórasjúkukanningarstovuna (F&DSK) á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

**Arbeiðsuppgávurnar á F&DSK eru m.a.**

1. at gera sjúkugreining av fiski og djórum við
   - PCR, RT-PCR, Real-time PCR, Real-time RT-PCR og Sekventering
   - Kyknudyrking
   - ELISA
2. at kanna reinhaldssýni fyri Listeria monocytogenes
3. at innkoyra nýggjar kanningarhættir
4. at luttaka í góðskuarbeiði

**Krøv til útbúgving og førleika**

Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur. Royndir við omanfyri nevndu kanningarhættum og tøkni er ein fyrimunur.

Somuleiðis eru royndir við telduskipanum til kanningarstovur sum LIMS ein fyrimunur.

Harumframt er tað eitt krav, at tú hevur koyrikort til bil.

Sum persónur vænta vit, at tú ert positiv/positivur, ert nærløgd/nærlagdur og dugir at arbeiða málrættað, bæði sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við onnur á deildini.

**Vit kunnu bjóða**

Eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði, har tú verður ein týðandi partur í menningini á F&DSK.

**Tíð og setanarviðurskifti**

Talan er um fulltíðarstarv við setan frá 1. november 2008 til 1. september 2009. Lønt verður eftir lønarflokki 4 sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið. www.lnd.fo.

**Umsókn**

Umsókn við avriti av prógvi, eftirútbúgving, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi **í seinasta lagi mikudagin hin 24. september 2008 kl. 12.**

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Debes H. Christiansen, leiðara á F&DSK.

*Á F&DSD starvast 10 fólk. Vit eru skipað í eina eftirlitsdeild (F&DSE) og eina kanningarstovu (F&DSK). F&DSE umsitur djórasjúkulógarverkið, og høvuðsuppgávurnar eru málsviðgerð og eftirlit. F&DSK er tilvísingarkanningarstova fyri fiskasjúkur og tekur sær av sjúkugreining og yvirvøku sambært djórasjúkulóggávuni. Vit hava nútímans kanningarstovur við framkomnari útgerð til molekylerbiologiskar, immunologiskar og aðrar kanningar. Kanningarstovan er nýliga akkrediterað av DANAK.*

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 556 400
Fax +298 556 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

VAST 459010

# Hjálparfólk til Tjaldurs Apotek

Søkt verður eftir hjálparfólki til framleiðsludeildina á Tjaldurs Apotek at byrja 15.oktober 2008.

Hevur tú hug at royna teg á einum spennandi arbeiðsplássi ?

**Arbeiðsuppgávur:**

- Vøruhandfaring
- Vaska framleiðsluútgerð
- Annað fyrifallandi arbeiði

**Førleikar:**
Vit vænta av tær, at tú:

- Er røsk/raskur og nærløgd/nærlagdur
- Hevur koyrikort
- Hevur góð samstarvsevni.

**Arbeiðstíð:** Full tíð

**Løn:**
Sambært galdandi sáttmála hjá starvsmannafelagnum.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Kjartan Mohr ella Eyðhild Fuglø; deildarleiðarar.

Send okkum nøkur orð um teg, saman við møguligum viðmælum/prógvum, innan 25.september 2008.

TJALDURS APOTEK - POSTBOKS 3010 - 110 TÓRSHAVN - TLF. 341100
WWW.APOTEK.FO

HTM
HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN



# Skrivstovufólk
## til Hjálpartólamiðstøðina

**Hevur tú hug at arbeiða á einum almennum stovni, har arbeiðsdagurin ikki stendur stillur, og uppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar – ja so hava vit júst brúk fyri tær!**

Eitt av starvsfólkum okkara hevur leitað sær aðrar avbjóðingar og er tí á HTM eitt fyribilsstarv sum skrivstovufólk leyst at seta beinan vegin og fyribils til 30. september 2009 við møguleika fyri føstum starvi.

Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna.

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a um**

- journalarbeiði
- móttøka og telefonmóttøka
- vanligt skrivstovuarbeiði so sum bókhald og skrivarauppgávur

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur**

- útbúgving sum skrivstovufólk
- drúgvar royndir frá líknandi arbeiði
- evnir at arbeiða við nógvum tingum í senn
- gott yvirlit
- góð samstarvsevnir
- góðan førleika at orða seg bæði munnliga og skrivliga á føroyskum
- góðan telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**

- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- tætt samstarv við starvsfelagar
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leiðara á HTM, telefon 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn ella við teldupostí til htm@almannastovan.fo

Umsóknarfreist: mánadagin 15. september 2008, kl. 14.00.

KREA